LM-137/2020

Fylgiskjal 3

**Fiskivinnuráðið**

**Fundur 2021/06**

Stutt frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum mikudagin 30. mars. 2021 kl. 15.00-16.00.

Møtt:
Jóanna Djurhuus, formaður
Jan Højgaard, Føroya Fiskimannafelag
Stefan í Skorini, Føroya Reiðarafelag
Jóhannus Martin Olsen, Føroya Ráfiskaseljarafelag
Jógvan Hansen, Føroya Ráfiskakeyparafelagið
Finnbjørn Vang, Meginfelag Útróðrarmanna
Annfinnur Garðalíð, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið

Ikki møtt:
Jastrid Wolles Niclasen, fyri feløgini hjá arbeiðsfólki á fiskavirkjum

Skrá:

0. Góðkenning av dagsskrá
1. Broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Loyvi at landa og avreiða í mesta lagi 15% uttanlands).
2. Uppskot til kunngerð um trolveiði innan fyri 12 fjórðingar sent tykkum til hoyringar.
3. Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir norðhavssild við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2021
4. Ymiskt. Fundur í vinnunevndini.

**Ad. 0**
Dagsskráin góðkend.

**Ad. 1**
Fiskivinnuráðið tekur undir við, at loyvt verður aftur at landa ein part av veiðuni uttanlands. Tó verður mett, at 15 prosent er ov lítið, um henda broyting skal muna. Um markið verður sett á bert 15 prosent, er vandi fyri, at møguleikin ikki kann nýtast, tí tá skal hvørt skipið hava eina rímiliga stóra kvotu, áðrenn møguligt er at landa eina last uttanlands og at gagnnýta hendan møguleikan. Tí verður mælt til, at markið verður í minsta lagi 25 prosent, eins og tað hevur verið áður.
Í lóg um vinnuligan fiskiskap hevði landsstýrismaðurin heimild í kunngerð at áseta reglur, sum avmarkaðu avreiðing av veiðu uttanlands til í mesta lagi 25 prosent av veiðuni gjørd upp fjórða hvønn mánað.

Í lóg um fyrisiting av sjófeingi frá 2017 varð upprunaliga skotið upp, at 75 prosent av allari veiðu skuldi landast um føroyskan bryggjukant. Tað vil siga, at í mesta lagi 25 prosent kundu landast uttanlands. Hetta varð tó broytt soleiðis, at øll veiða skuldi landast í Føroyum, uttan at reiðarí og manningarfeløg vórðu hoyrd ella tikin við uppá ráð í viðgerðini.
Mælt verður til, at funnin verður ein javnvág millum ymsu áhugamálini í fiskivinnuni, soleiðis at aftur verður loyvt at landa í minsta lagi 25 prosent av veiðuni uttanlands.
Týdningarmikið er eisini, at landsstýrismaðurin varðveitir heimildina til at veita eitt meira umfatandi undantak, tá ið tørvur er á hesum.